# MFS á ferð



*Gurið Weihe, her avmyndað saman við Hallu Nolsøe Poulsen, er á kunningarferð kring landið at greiða miðnámsskúlanæmingum frá um hægri útbúgving saman Anniku Helgadóttir Joensen.*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

**Umboð fyri MFS eru komin til Føroya á árliga lestrarkunningarferð kring landið**

LESNAÐUR
*Heri á Rògvi*

Aftur í ár eru umboð fyri MFS komin til Føroya úr Danmark at greiða frá um lestrarviðurskifti uttanlands.

Í ár eru tað tær báðar, Gurið Weihe og Annika Helgadóttir Joensen, sum ferðast kring landið fyri at siga eitt sindur um útbúgvingar.

– Dentur verður lagdur á at greiða frá at kunna um fíggjarlig, sosial, faklig og praktiskt viðurskifti. Vit fara sjálvandi ikki inn í hvørt fak sær, men royna at kunna breitt um ymisk praktisk viðurskifti, sigur Gurið Weihe.

Sjálv lesur Gurið stjórnmálafrøði á síðsta ári, og Annika lesur sálarfrøði á triðja ári. Tær eru báðar í MFS ráðnum.

Við sær hava tær eisini Holger Arnbjerg frá Altjóða skrivstovuni, sum kunnar um útbúgvingar uttanfyri Norðurlond.

Gurið sigur, at teir flestu næmingarnir velja at halda ein steðg í eitt ár ella longur, áðrenn farið verður av landinum í lestrarørindum.

Hon hevur ikki inntryk av, at flestu næmingarnar eru byrjaðir at hugsa av álvara at lesa víðari.

– Oftani byrja næmingar at hugsa um víðarilestur í endanum av 3. S ella í 2. HH, sigur Gurið Weihe.

Kunningin hjá teimum snýr seg serliga um Danmark, og tá tær báðar lesa í Keypmannahavn, so er tað nærliggjandi, at tær duga best at siga frá viðurskiftum í danska høvuðsstanum.

### Mest fíggjarligt

Annika og Guðrun lata væl at áhugan hjá næmingunum fyri kunningini. Næmingarnir eru serliga fegnir um, at fíggjarliga viðurskifti verða tikin fram og greitt frá.

Tað eru eisini serliga fíggjarlig og onnur praktisk viðurskifti, ið næmingarnir spyrja um, sigur Gurið. Eitt nú hvussu virkar Føroya frádrátturin.

Higartil hava MFS umboðini verið í Hoydølum, á Kambsdali og í Vestmanna. Mánadag vera tey á Handilsskúlanum í Havn, og týsdagin fara tey um Suðuroyarfjørð og vitja á miðnámsskúlanum í Suðuroy.

Pauli Nielsen, fyrsti formaður hjá Altjóða Barnalegum í Føroyum:

# Orðið er heimsins sterkasta makt



*Pauli Nielsen var fyrsti formaðurin í CISV*

**Arbeiðið hjá Altjóða Barnalegum er enn sum áður eitt neyðugt klípi í tí garði, sum fleiri og fleiri menniskju um allan heim royna at byggja um eina friðarliga og mannsømiliga framtíð hjá heimsins fólki**

RØÐA
*Pauli Nielsen*

Eg skal fyrst av øllum takka teimum, sum hava verið við til at halda lív í Altjóða Barnalegum í Føroyum øll hesi árini. Uttan tykkara ósjálvsøkna arbeiði hevði tað ikki verið gjørligt hjá mær at staði her í dag og minst aftur á, hvussu vit komu upp í hetta fyri 25 árum síðani.

Eg var lærari á Venjingarskúlanum tá, og ein dagin kom Jorun Simonsen, sum eisini var lærari har tá, við einum brævi úr Noregi.

Hon spurdi, um eg kundi hyggja at tí.

Brævið var frá einum norðmanni, Ketil Lehland, sum greiddi frá endamálinum við CISV. Hann skrivaði, at tey fegin vildu hava Føroyar við, og bjóðaði 2 gentum og 2 dreingjum á 11 ára aldri, og einum vaksnum leiðara, á altjóða barnalegu á Stai í Noregi ein mánaða sama summarið. Hetta var í 1978. Hann skrivaði eisini, at hamnn áður hevði roynt at fáa samband hendavegin, men tað hevði ikki eydnast.

Áheitanin ljóðaði sera spennandi, so eg gjørdi av, at eg skuldi svara játtandi aftur.

So var at finna børnini.

Sjálvur hevði eg eina dóttir, Elsu, sum var 11 ár, og mamma hennara vildi fegin fara sum fyrsti føroyski leiðarin á eina legu hjá Altjóða Barnalegum, sum vit valdu at kalla felagsskapin á føroyskum.

Skjótt komu Kristjan, Jóan Petur og Eyð uppí, og so fóru vit øll, børn og foreldur, at fyrireika okkum til leguna, soleiðis sum Ketil Lehland greiddi okkum frá, at vit skuldu.

Legan gekk væl, og vit, sum vóru so heppin at senda børn okkara á fyrstu leguna, vit samdust um, at her var vert at vera uppií, men vit vistu eisini, at um vit veruliga vildu koma uppí millum hini heimsins lond, so var best at taka dik á okkum beinanvegin og gera eina barnalegu í Føroyum næsta summarið. Vit vistu, at vit fóru at fáa ov mikið um oyruni, tí eitt var at skipa fyri leguni, men annað mál var at fáa pening til vega at halda leguna fyri. Tað er soleiðis, at vertslandið rindar allar útreiðslurnar av sjálvari leguni. Vit fingu góða hjálp og nógv beinasemi so at siga allastaðni, har vit spurdu, og onnur vaksin komu aftrat at hjálpa okkum, sum byrjaðu summarið fyri.

Vit vóru ung tá, sum tit er, sum nú taka toyggið. Vit sluppu at nýta Meginskúlan á Sandi til endamálið, og so var eftir at fáa altjóða skrivstovuna at góðkenna okkum sum vertsland til eina av barnalegunum í 1979.

Um hetta skrivar Ketil Lehland skemtiliga í CISV-blaðnum nøkur ár seinni:

»Eftir fyrstu leguna, sum føroyingar vóru við á – hetta var legan á Stai í Noregi – komu luttakararnir til Oslo, og Pauli Nielsen var eisini har.

Vit hittust heima hjá núverandi norska landsformanninum í CISV, Åse Lier, og har tók Pauli meg til viks og spurdi: »Hvat eiga vit at gera fyri at sleppa at hava eina altjóða barnalegu í Føroyum komandi summar?«

Vanliga er tað jú so, at neyðugt er at gera eitt stórt arbeiði fyri at fáa gongd á CISV í einum nýggjum landi, og ikki minst fyri at fáa eitt nýtt limaland til at tora at gera eina legu. Og her kendi eg, at eg næstan mátti gera tað mótsetta við at minna á, at »tað kostar nógvar pengar« og at »tað krevur nógv arbeiði«. Men Pauli helt, at tað mundi nokk fara at ganga við tí, og tað gekk eisini, so Føroyar enn standa sum eindømi í CISV-søguni – at skipa fyri altjóða barnalegu longu árið eftir, at landið hevur verið á fyrstu barnaleguni.

Áðrenn tað var komið so langt,« skrivar Ketil Lehland víðari, »hevði eg verið á altjóða aðalfundi og nevnt møguleikan fyri legu í Føroyum. Tey flestu søgdu bara »What country??« Eitt sindur av skemti kom eisini. Aðalskrivari okkara, Bill Matthews, sum er ein fittur og sakligur maður, ið ikki loypur á leistum eftir øllum beinanvegin, segði: »What´s next - Rockall?«

Tað besta og stuttligasta av øllum var at uppliva, at eingin, heldur ikki frá danskari síðu, segði, ja, men Føroyar eru jú danskar.«

Soleiðis byrjaði tað, og CISV í Føroyum kann vera errið av øllum tí, sum nátt er hesi árini síðan 1978.

So avgjørt minsta limalandið hevur megnað at hava tríggjar legur í seks ár, eitt virksemi sum nógv limalond við nógvum hundrað ferðir so stórum fólkatali kunnu øvunda føroyingum.«

So mikið Ketil Lehland.

Og tí, góðu áhoyrarar, havi eg hug at siga: vit føroyingar nýtast ikki at smæða okkum burtur, bara vit taka tað arbeiðið á okkum, sum skal gerast, og ta ábyrgdini., sum hoyrir við.

Sum eg standi her beint nú haldi eg tað vera heilt súmbolskt at uppliva so staðiliga, at føroyskar røddir hoyrast og verða virdar uttanfyri Føroyar, soleiðis sum vit hoyrdu og sóu tað fyri bara nøkrum fáum tímum síðani. Eg hugsi um ungu tvøroyrargentuna, sum lokkaði tárini fram í eyguni á nógvum hundrað túsnd fólkum í gjárkvøldið.



